# Nýggju Beta-trolararnir koma um 3 vikur

**Skiparar verða víkarmaðurin, Ólavur Samuelsen og streymnesmaðurin, Kjartan Egholm**



*– Tað verður ógvuliga spennandi at fáa tvey nýggj skip, heldur Olaf Olsen, reiðari, sum her er avmyndaður undir liðini á soninum, Ragnari Olsen, sum nú eisini starvast hjá reiðarínum eftir fleiri ár í starvi hjá Føroya Banka*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nú líðir væl við nýggju trolarunum, sum P/F Beta í Saltangará letur byggja í Vigo í Spaniu.

Dagurin fyri navngevingini er settur til leygardagin, 23. november, og ætlandi loysa skipini í Spaniu, mánadagin, 25. november.

Olaf Olsen, reiðari, væntar, at nýggju skipini verða í Føroyum týsdagin, 3. desember.

– Báðir bátarnir eru klárir, tá ið teir fara úr Spaniu, og væntandi fara teir fyrsta túrin longu miðskeiðis í somu viku, sum teir koma, sigur hann.

Skiparar verða víkarmaðurin, Ólavur Samuelsen, sum hevur ført Gorp og streymnesmaðurin, Kjartan Egholm, sum hevur ført Skráp.

Tað merkir tó ikki, sigur Olaf Olsen, at Gorpur og Skrápur eru millum tey trý skipini, sum fara úr flotanum fyri teir nýggju.

Hann vil tó ikki siga, hvørji trý skip fara úr vinnu fyri nýbygningarnar.

## Nakrir færri

Maskinmenninir hava verið í Spaniu eina tíð, og tann eini hevur fylgt arbeiðnum meginpartin av tíðini. Ein partur av manningini er eisini farin niður til Vigo at rigga skipini til.

Í komandi viku fer so restin av manningini avstað saman við fólki frá reiðarínum, sum skulu vera við, tá ið skipini verða latin og navngivin.

Olaf Olsen sigur, at manningartalið umborð á nýggju skipunum verður tað sama, sum við teimum gomlu, og tá ið trý skip fara úr flotanum fyri tvey, merkir tað, at samlaða manningartalið verður heldur minni.

– Men nýggju skipini verða meira í sjónum enn tey gomlu, og tað merkir so aftur, at vit koma at hava fleiri avloysarar, leggur hann aftrat.

Reiðarin vísir á, at tey gomlu skipini krevja meira røkt enn tey nýggju, og tí má roknast við, at nýbygningarnir verða drúgvari í sjónum.

## Útgerðin føroysk

Ein stórur partur av útgerðini umborð á nýggju trolarunum hjá P/F Beta er føroysk.

Fiskireiðskapurin er føroyskur; hann hevur trolvirkið, Vónin, latið, og radioútgerðin er keypt frá Radiohandlinum í Saltangará. Haraftrat hevur maskinverkstaðurin, FJM í Runavík, bygt og sett arbeiðsdekkið upp og somuleiðis bondini, sum føra fiskin niður í lastina.

Olaf Olsen sigur, at umstøðurnar hjá manningini umborð á nýggju skipunum kunnu ikki samanberast við umstøðurnar umborð á teimum gomlu – hvørki, tá ið ræður um sjálvar arbeiðsumstøðurnar og umstøðurnar hjá manningini annars.

– Vit eru ógvuliga spentur uppá at fáa nýggju skipini heim og fáa tey í vinnu, sigur reiðarin.

Nýbygningarnir eru 38 metrar langir og 9,5 metrar breiðir. Teir eru merktir 462 bt., og maskinorkan er 1305 hk.

Gomlu skipini eru á leið somu longd sum tey nýggju, men eru merkt 388 bt.

# Eitt hampiliga gott ár í nøgd og peningi

**– Útlit eru til, at árið í ár verður tað besta í nøgd, síðan tey bæði árini í fyrru helvt av áttatiárunum, 1983 og 1984, sum royndust so væl, sigur Olaf Olsen, reiðari**




*– Upsaprísurin hevur verið lágur í summar, men hann er nú komin nakað uppaftur, sigur Olaf Olsen, reiðari, sum heldur, at smái upsin er ein orsøkin til prísfallið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nú árið er farið at halla, hava vit spurt Olaf Olsen, reiðara, hvussu gongdin hjá Beta-skipunum hevur verið í ár.

Olaf letur hampiliga væl at og sigur, at fiskiskapurin hevur verið hampiliga góður – so mikið góður, at hetta árið helst verður tað besta í nøgd síðan 1983 og 1984. Í peningi er talan eisini um eitt gott ár, hóast prísirnir á upsa ikki hava verið so góðir sum seinasta ár.

## Prísfall í summar

Reiðarin sigur, at miðalprísirnir á upsa yvirhøvur hava verið lægri í ár enn í fjør, og serliga í summar og fyrr í heyst hevði upsin lágan prís.

– Stundum var torført at sleppa av við fiskin, og tí hava vit verið nakrar ferðir uttanlands og selt.

Olaf ásannar, at upsin er smærri í ár enn í fjør og heldur, at hetta hevur ávirkað prísirnar.

– Tá ið upsin er smáur, fáa virkini færri tons ígjøgnum maskinurnar, og tað gongur útyvir framleiðsluorkuna og harvið eisini útyvir nøgdirnar, sum virkini keypa. Minkar eftirspurningurin, kann væntast, at prísurin eisini lækkar.

## Hvar er 3'arin?

Olaf Olsen, sum hevur ført hagtøl yvir fiskiskapin hjá Beta-trolarunum í mong ár, undrast yvir, hvat vorðið er av upsanum, sum veiddur varð í fjør.

– Í fjør var størsti partur av veiðini upsi 3, meðan størsti parturin í ár er upsi 4.

Hugsast kundi, at árgangurin, sum fekst í fjør, var størri í ár, men soleiðis er tað ikki, tvørturímóti.

– Eg trúgvi, at fiskurin – og tá ikki minst upsin – er meira »bevegiligur«, enn vit halda; tí er gongdin, sum hon er, og hon er ikki altíð so løtt at skilja.

Um útlitini annars, heldur reiðarin, at tey eru torfør at meta um.

– Fiskiskapurin hevur verið góður í ár, og í løtuni hava skipini eisini hampiliga góðan fiskiskap, men ilt er at spáa um framtíðina, tá ið tú hevur við fisk at gera, leggur hann aftrat.

Olaf Olsen sigur at enda, at miðalprísurin á upsa liggur um 5 kr. fyri kg., og tað er heldur lakari prísur enn í fjør.

– Men prísurin er so hækkaður nakað aftur eftir fallið í summar, men hann er ikki komin heilt uppá sama støði aftur, sum hann var í fjør, sigur reiðarin.



# Ikki ráð til at taka nýggja Landssjúkrahúsið í nýtslu

**Nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum verður liðugur á Ólavsøku, men hann fer at standa gapandi tómur, tí vit hava ikki ráð til at keypa útgerð og tól, so at hann kann takast í nýtslu**



*Tá ið nýggi bygningurin á Landssjúkrahúsinum verður liðugur í juli mánað komandi ár, fer hann at at standa tómur, tí vit hava ikki ráð til at taka hann í nýtslu. Poul Geert Hansen, leiðari á Landssjúkrahúsinum, sigur, at næstan 50 milliónir mangla í fyri at bygningurin kann takast í nýtslu*

SPARINGAR OG HEILSUVERK
*Áki Bertholdsen*

Á Ólavsøku verður nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum liðugur.

Men tey, sum í langa tíð hava glett seg til betri umstøður á Landssjúkrahúsinum, mugu brynja seg við toli í óasetta tíð.

Tí hóast bygningurin verður liðugur, merkir tað ikki, at hann verður tikin í nýtslu.

Tað hava vit nevniliga ikki ráð til!

At kalla ongin peningur er settur av til at keypa tól fyri og tí er tað greitt, at nýggi bygningurin ikki verður tikin í nýtslu, tá ið hann er liðugur.

Poul Geert Hansen, leiðari á Landssjúkrahúsinum, sigur, at ein uppgerð yvir tørvin, vísir, at tól, innbúgv og útgerð skulu keypast fyri 44 milliónir fyri at kunna taka nýggja bygningin í nýtslu.

Næsta ár eru bara fimm milliónir settar av til nýggj tól á uppskotinum hjá landsstýrinum til fíggjarlóg. Men tað kann ikki brúkast til nakað sum helst, tí tað er bara ein dropi í havinum.

Tað ringasta er kortini, at tær fimm milliónirnar røkka ikki so frægt sum til tey mest neyðugu tólini, sum mugu byggjast inn í sjálvan bygningin og sum sostatt eisini mugu setast upp, samstundis sum bygningurin verður gjørdur liðugur.

– Tól og útgerð fyri einar 10 milliónir skulu byggjast inn í bygningin og tey mugu setast upp, áðrenn bygningurin verður gjørdur liðugur, tað vil siga áðrenn í juli næsta ár, tá ið bygningurin skal verða liðugur eftir sáttmálanum. Sostatt koma fimm milliónir at mangla í, bara til ta útgerðina, sum má keypast beinanveg. Verður hendan útgerðin ikki keypt, ber ikki til at gera bygningin lidnan.

## Kanska í 2004

Poul Geert Hansen sigur, at landsstýrið hevur boðað frá, at ætlanin er at játta peningin í 2004.

– Sostatt kann útgerðin kanska bíleggjast í 2003 og setast upp fyrst í 2004, so at bygningurin kann takast í nýtslu einaferð út á árið í 2004.

Sostatt kemur bygningurin í besta føri at standa tómur til einarferð í 2004. Men í grundini veit ongin, nær bygningurin verður tikin í nýtslu, tí politiskar ætlanir kunnu skjótt broytast og Poul Geert Hansen heldur, at tað kann saktans henda, at tað kemur at ganga longri tíð enn so, áðrenn nýggi bygningurin kann takast í nýtslu.

Men samstundis vísir hann á, at tað er heldur ikki nóg mikið av pengum næsta ár til at gera sjálva byggingina lidnað.

– Tað verða avsettar 35 milliónir til byggingina komandi ár. Men tað koma at mangla einar 9-10 milliónir í fyri at gera hana lidnað.

Hetta er peningur sum skal til fyri at broyta skurðgongina, forhøllina og annað á Landssjúkrahúsinum fyri at samanbinda gamla og nýggja bygningin.

Tí heldur Poul Geert Hansen, at Løgtingið ikki sleppur undan at játta einar 14-15 milliónir afturat til Landsjúkrahúsið næsta ár uttan at tað verður nógv dýrari og uttan at bróta teir sáttmálar, sum eru gjørdir.
Av teimum skulu 9-10 milliónir brúkast til sjálva byggingina og einar fimm milliónir skulu brúkast til tól, sum skulu byggjast inn í bygningin, afturat teimum fimm, sum eru á fíggjarlógini.

## Umhugsa møguleikar

Leiðarin á Landssjúkrahúsinum sigur, at eitt uppskot hevur verið at gera eina verklagslóg komandi ár, sum bindur Landsstýrið til at játta neyðuga peningin í 2004. Hendir tað, kann útgerðin bíleggjast komandi ár, tá ið lógin er samtykt, so at hon kann leverast í 2004. Men tað er alt óvist enn.

Hann vísir kortini á, at tá ið peningur verður játtaður til útgerð og tól, hevði tað avgjørt verið ein fyrimunur, at játtanin verður so mikið stór, at alt kann keypast í senn.

– Fyri tað fyrsta eru møguleikarnir fyri at fáa avsláttir betri, tess størri keypið er.

Men hann heldur, at tað er ein spurningur um hetta er ein útreiðsla, sum skuldi komið undir útbyggingarkvotuna hjá landsstýrinum, tí tað allarmesta av útgerðini verður keypt uttanlands og tí hitar tað ikki búskapin og leggur ikki trýst á arbeiðsmarknaðin.

Men hann dylir kortini heldur ikki fyri, at sum ábendingarnar eru nú, er ikki væntandi, at alt fer at verða játtað í einum, so tað fer kanska at taka nøkur ár keypa útgerðina, so at nýggi bygningurin kann takast í nýtslu.

Næsta ár er ætlanin at Landssjúkrahúsið skal fáa 40 milliónir, 35 milliónir til bygging og fimm milliónir til tól. Fær Landssjúkrahúsið eisini 35-40 milliónir í 2004, kemur framvegis 10-15 milliónir at mangla í. Tí kann tað hugsast, at útgerðin fer at verða keypt í 2004 og 2005, so tað fer at taka langa tíð at taka nýggja bygningin í nýtslu.

Poul Geert Hansen heldur, at tað er rættiliga óheppið, at tað ikki skal bera til at taka bygningin í nýtslu, nú hann er liðugur.

– Landssjúkrahúsið hevur bráðneyðugan tørv á meiri plássið og nýggi bygningurin hevur verið eitt ljóspunkt, og starvsfólkið hevur avgjørt sæð fram til at fáa nýggi bygningurin skuldi blíva liðugur. Tí er tað sjálvsagt frustrerandi at koma í hesa støðuna.

Hann sigur, at tey høvdu vænta at fáa pening til útgerð næsta ár, tá ið tørvurin var á tí og tað var eisini ætlanin. Men tá ið fíggjarlógin varð løgd, varð upphæddin tikin av.